Góðu 6. flokkar,

Nú nærkast dagurin, har tit skulu til Vágs, í Marghøllina at kappast í 1. umfarinum í Skúlafótbólti, sum verður fyri 6. flokkar ónsdagin 24. oktober.

Tað er tilmeldaði 29 lið í 6. flokki. Tilsamans eru tað umleið 265 næmingar (umframt teir næmingar, sum koma við, men sum ikki fara at spæla).

Á heimasíðuni www.skulafótboltur.fo, undir Kappingar & úrslit og 6. flokkur (beinleiðis leinkja her: http://skulafotboltur.fo/kappingar-urslit/6-flokkur/) síggja tit hvørji lið eru tilmeldaði.

Týsdagin 23. oktober verður leikskráin løgd út á heimasíðuna – á síðuna, sum víst er til omanfyri.

**Kunnu bíleggja døgurða**

Minnist til, at tað ber til at bíleggja døgurða (grýturætt v/rís) í Marghøllini, sum kostar 65 kr. fyri hvønn. **Seinasta freist at bíleggja er mánadagin 22. okt. kl. 13.00** (vit mugu hava stundir at fyrireika hetta 😉)

**Ferðaætlanin hjá Smyrli og bygdaleiðir**

*Til tykkum, sum koma við Smyrli*: Smyril fer av Havnini ónsdag kl. 8.30 og tit eru so á Krambatanga á Tvøroyri kl. 10.30. Bussar við átekningini "Skúlafótbóltur" bíðar á keiini eftir tykkum. Hesir bussar koyra beinleiðis til Marghøllina – og eru tit í Marghøllini umleið kl. 11.00.

Bussarnir koyra eisini úr Marghøllini kl. 17.30 og á Krambatanga, har Smyril hevur fráferð kl. 18.30.

**Minnist til 😉**

Minnist til ítróttarklæðir, fótbóltsskógvar og skinnarar (hetta er eitt krav!).

Minnist eisini til at taka svimjiklæðini við, tí møguleiki verður at fara at svimja í Páls Høll (ókeypis fyri luttakandi liðini) áðrenn tit fara heim aftur.

Eru ivamál ella spurningar, so kunnu tit altíð senda okkum ein teldupost ella ringja (til Jens Petur á 285000)

Vit gleða okkum til at fáa eina góðan og spennandi dag saman við tykkum 😉

Bestu heilsur

Dennis Holm (dennis@vagur.fo) & Jens Petur Brattalíð (jenspetur@margholtin.fo)

Skúla fótbóltur

www.skulafotboltur.fo